# Eingin tekur Klaksvíks-kvinnurnar

**Hesaferð tók Dráttur ímóti Mjølni, men tó at heimaliðið tók fyrsta settið, so var hetta ikki nóg mikið í longdini**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tær tykjast aftur í ár at vera einaráðandi. Kvinnurnar úr Klaksvík.

Seinastu mongu árini hava tað eisini fyrst og fremst verið tær, sum hava myndað føroyska flogbóltsoddin, og tó at TB, ÍF og Dráttur skiftandi hava stungið seg fram, so hava kvinnurnar úr Klaksvik verið felagsnevnarin hesi árini.

Og í ár er so ikki líkt til, at nakar skal skala tær. Seinastu tvær vikurnar hava tær leikt útidystir móti ávíkavist TB og Drátti, sum verða roknað sum truplastu mótstøðuliðini hetta kappingarárið, og tað gav so ikki Mjølni stórvegis av trupulleikum.

Dysturin móti Drátti hesaferð var tó kanska truplasta uppgávan, sum liðið hevur higartil, og fyrsta settið fór heimaliðið eisini avstað við. Tey bæði næstu settini prógvaðu tó, at tað var veruligur munur á liðunum báðum. Mjølnir tók hesi so ruddiliga, og tó at fjórða og seinasta settið ikki var heilt so sannførandi, so var kortini eingin ivi um, at Dráttur hevði tapt fyri einum betri liði.

Í Hoyvíkarhøllini hevði KÍF vitjan av SÍF, og her eydnaðist nýggja liðnum at vinna sær eitt sett. Talan var sum eisini um eina javna uppgerð. KÍF tók tey bæði fyrstu settini, men munurin var ikki tann heilt stóri, og tá KÍF so vann triðja settið, hómaðiast av álvara spenningur í dystnum. Tað eydnaðist tó KÍF at taka stigini við sigri í fjórða settinum, men avrikið man í øllum førum geva teimum í SÍ góðar vónir.

Seinasti dysturin var í Trongisvági, har TB hesaferð hevði vitjan av ÍF. Tann dysturin gjørdist ongantíð nakað serliga spennandi. Fyrsta settið var munurin annars ikki so stórur, men tá TB so tók hetta, samstundis sum leikararnir ásannaðu, at hetta kundi gerast betri, so var einki at heinta hjá ÍF



*SÍ vann sítt næsta sett á árinum, og tó at tað ikki rakk til stig, so bar avrikið boð um, at fyrstu stigini eru farin at nærkast*

### Úrslit

**Meistaradeild kvinnur**
**KÍF-SÍ** 3-1 (25-22, 25-22, 23-25, 25-19)
**Dráttur-Mjølnir** 1-3 (27-25, 17-25, 13-25, 19-25)
**TB-ÍF** 3-0 (25-23, 25-11, 25-14)

# Fleyr skapti spenningin

**Higartil einaráðandi Mjølnir tapti fyri einum væl uppløgdum Fleyr-liði, og nú er av álvara spenningur komni í mansdeildina**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

So hendi tað, sum flestu flogbóltshugaði høvdu vónað. Mjølnir, sum annars hevur hótt við at gera flogbóltskappingina hjá monnum til eina langa sigursrøð, varð steðgað um viku-skiftið, tá teir vitjaðu hjá Fleyr.

Fleyr hava í ár givið ábendingar um, at teir kanska kundu fara at gera nakað um seg, men kortini hevur tað leingi tókst, sum skuldu klaksvíkingarnir verða ov stinnir.

Hendan myndin broyttist tó leygardagin. Havnarmenninir gjørdu alt fyri eitt greitt, at her skuldi Mjølnir ikki fáa nakað sum helst ókeypis. Við einum góðum stríðsvilja og disciplini í spælinum eydnaðist eisini vertunum at koma á sigurskós, tá teir tóku tey bæði fyrstu settini. Um teir hildu, at nú var sloppið, so fóru teir tó skeivir. Mjølnir vildi í øllum førum ikki geva seg, og tá Fleyr var farið at gleða seg dekan ov tíðliga, gjørdist talan um rættiligt skrædl í triðja settinum. Tað hevur áður víst seg í líknandi dystargongdum, at tað kann gerast tungt at venda, um tú tapir tríja settið, men hetta megnaðu teir á heimaliðnum kortini.

Teir vunnu aftur á beint, og við einum framúr fjórða setti, eydnaðist at taka stigini, sum av álvara skaptu spenning aftur í deildina.

## SÍ í oddin

Her er Fleyr framvegis á triðja plássinum, men nú bert tvey stig aftan fyri Mjølnir. Og SÍ slapp sær so ájavnt klaksvíkingunum, tá teir vitjaðu Fram. Her var eingin ivi um, at stigini skuldu fara vestur við gestunum. Fram royndi annars at stríðast, men yvirvaldið var tó ov stórt.

Og so verður av álvara spennandi at síggja, hvussu leikur fer at fara hjá sørvingunum. Teir hava enn dystir móti Mjølni og Fleyr eftir í grundspælinum, og teir báðir dystirnir kunnu gera, at SÍ verður einsamalt oddalið, tá farast skal undir endaspælið. Hinvegin er eisini møguleiki fyri, at alt verður so púrasta javnt, og undir øllum umstøðum tykist tað nú soleiðis, at spenningurin skal halda sær heilt fram móti seinasta leikdegi. Og tað er í øllum førum at fegnast um.



*Við einum sannførandi stríðsavriki eydnaðist leygardagin Fleyr at basa Mjølnir*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Úrslit

**Meistaradeild menn**
**Fram-SÍ** 0-3 (15-25, 20-25, 22-25)
**Fleyr-Mjølnir** 3-1 (25-21, 25-21, 9-25, 25-21)



*Samstundis vunnu sørvingar seg heilt fram í oddin, tá teir vunnu sannførandi sigur á Fram*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 6 | 6 | - | 0 | 18 | 4 | 14 | 12 |
| 2 TB | 6 | 5 | - | 1 | 15 | 6 | 9 | 10 |
| 3 KÍF | 6 | 4 | - | 2 | 12 | 9 | 3 | 8 |
| 4 Dráttur | 6 | 2 | - | 4 | 13 | 13 | 0 | 4 |
| 5 ÍF | 6 | 1 | - | 5 | 5 | 15 | -10 | 2 |
| 6 SÍ | 6 | 0 | - | 6 | 2 | 18 | -16 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 5 | 4 | - | 1 | 13 | 5 | 8 | 8 |
| 2 Mjølnir | 5 | 4 | - | 1 | 13 | 6 | 7 | 8 |
| 3 Fleyr | 5 | 3 | - | 2 | 11 | 7 | 4 | 6 |
| 4 Fram | 5 | 1 | - | 4 | 5 | 13 | -8 | 2 |
| 5 ÍF | 4 | 0 | - | 4 | 1 | 12 | -11 | 0 |







Góðir brúktir bilar

| | |
|---|---|
| **Nissan Micra** árg 1992, vínreyður, 5 hurðar, km. 86.000 **19.000** | **Opel Vectra 2.0 DT, Stc** árg 1997, svartur, 5 hurðar, km. 182.000 **89.000** |
| **Nissan Almera 2.0 Diesel** árg 1999, vínreyður, 4 hurðar, km. 106.000 **98.000** | **Opel Vectra 2.0 Dti, Stc** árg 1999, hvítur, 5 hurðar, km. 84.000 **125.000** |
| **Nissan Almera 1.4 Nordic Van** árg 1999, vínreyður, 4 hurðar, km. 52.000, sýnaður sep 2004 **v/mvg 72.000** | **Opel Vectra 2.0 DT** árg 1998, bláur, 4 hurðar, km. 133.000 **89.000** |
| **Peugeot 106 Diesel** árg 1995, bláur, 3 hurðar, km. 92.000 **45.900** | **Opel Vectra 1.8 16v** árg 1998, lj. bláur, 4 hurðar, km. 106.000 **97.000** |
| **Peugeot 307 2.0 D 110HK** árg 2002, gulur, 5 hurðar, km. 70.000 **179.000** | **VW Golf 1.9 Diesel Vøruv.** árg 12/1996, hvítur, 5 hurðar, km. 140.000 **59.000** |
| **Peugeot 406 1.8 bensin** árg 1997, grønur, 4 hurðar, km. 130.000 **99.000** | **Mazda E2200 Lastbilur** árg 1996, reyður, 2 hurðar, km. 69.000 **69.000** |
| **Peugeot 807 ST 2.2 Hdi Van** árg 2003, beige, 5 hurðar, km. 23.000 **v/mvg 238.000** | **VW Polo Diesel** árg 1998, bláur, 4 hurðar, km. 130.000 **88.000** |
| **Peugeot 607 Hdi 2.2 Aut** árg 2002, gráur, 4 hurðar, km. 110.000 **239.000** | **Mazda 323 1.3** árg 1997, reyður, 3 hurðar, km. 115.000 **49.000** |
| **Peugeot Expert Van 2.0 Hdi** árg 2000, reyður, 4 hurðar, km. 47.000 **v/mvg 119.000** | **Jeep Cherokee 2.5 TD persónbilur 4x4** árg 1995, grønur, 5 hurðar, km. 130.000 **89.000** |
| **Opel Combo 1.4 Van** árg 1999, hvítur, 3 hurðar, km. 49.000 **v/mvg 55.000** | **Ford Escort 1.8 Bensin** árg 1995, grønur, 4 hurðar, km. 104.000, **49.000** |
| **Opel Corsa 1.2 16v** árg 2002, bláur, 3 hurðar, km. 62.000 **98.000** | **Toyota Corolla** árg 1991, hvítur, 3 hurðar, km. 161.000 **22.000** |
| **Opel Astra 2.0 DTI TD** árg 1999, bláur, 4 hurðar, km. 72.000 **109.000** | **Toyota Carina II 1.6** árg 1989, reyður, 4 hurðar, km. 258.000, sýnaður *mai 2004* **nú 22.000** |
| **Opel Astra 1.6 AC** árg 2001, bláur, 5 hurðar, km. 35.000 **109.000** | **Toyota Carina II 1.6** árg 1989, reyður, 4 hurðar, km. 226.000, sýnaður *juli 2004* **nú 22.000** |
| **Opel Astra 1.6 Club** árg 1998, bláur, 5 hurðar, km. 105.000 **87.000** | **Toyota Corolla 1.6** árg 1999, beige, 5 hurðar, km. 86.000 **89.000** |
| **Opel Astra 1.6 AC** árg 2001, svartur, 5 hurðar, km. 30.000 **109.000** | **Saab 96 (ellisakfar) 2 takt, 3 cyl** árg 1964, bláur, 5 hurðar, km. 147.000 **5.000** |
| **Opel Astra 1.6 bensin** árg 2000, svartur, 5 hurðar, km. 80.000 **89.000** | **Citroen C2 Bensin** árg 2003, svartur, 3 hurðar, km. 12.500 **nú 129.000** |
| **Opel Astra 1.7 DT** árg 1999, grønur, 5 hurðar, km. 104.000, nýsýnaður **105.000** | **Kia Sephia 1.5 GTX bensin** árg 1997, reyður, 4 hurðar, km. 139.000 **65.000** |

Gevi gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.bilarge.fo

Sosialurin 341800

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 34 54 00




Forlagið Hellurnar
v/Jústinus Leivsson Eidesgaard · Ovaragøta 1 · 188 Hoyvík
Tel. 22 31 43 · justinus@post.olivant.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Heimavitjanartænastan**

Fer at halda til áTjarnargarði

Endamálið við tænastuni er m.a:
- at vitja í heiminum hjá teimum gomlu tvær ferðir um árið
- at práta um gerandisdagin
- at veita heilsuvegleiðing
- at kunna um tilboðini í kommununi

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

## Starvsfólk til Heimavitjanartænastuna

Heimavitjanartænastan hjá Tórshavnar kommunu søkir starvsfólk at gera heimavitjanir hjá fólki í kommununi, sum eru eldri enn 75 ár at byrja 1. februar 2005 ella eftir avtalu.

**Útbúgving**
Viðkomandi útbúgving. Fyrimun hava fólk við útbúgving innan sosial- og heilsuviðurskifti so sum sjúkrarøktarfrøðingar, ergo- og fysioterapeutar, heilsuatstøðingar ella fólk við aðrari viðkomandi útbúgving.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er at umsøkjarin hevur kunnleika til:
- vanligar ellisbroytingar
- heilsuligar, almennar og sálarligar broytingar hjá eldri fólki
- at kunna meta um førleika
- kommunal, almenn og privat tilboð
- samskifti við eldri fólk
- heilsufremjan og fyribyrging
- EDV á brúkarastøði

**Persónligir eginleikar**
Viðkomandi skal vera fyrikomandi og álitisvekjandi.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Starvið verður skipað undir Trivnaðarfyrisitingini í Tórshavnar kommunu.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Jónvør Christiansen, leiðara fyri Heimavitjanartænastuni, á telefon 302063 millum klokkan 8-9, ella Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara, á telefon 302010.

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum og upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 15. desember 2004.